Sirið Stenberg
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um umstøður á Barnaheiminum og nýtt barnaheim, settur landsstýrismanninum í almannamálum, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Hvat verður ítøkiliga gjørt fyri at bøta um umstøðurnar hjá børnunum, sum eru á Barnaheiminum?
2. Hvat verður ítøkiliga gjørt fyri at bøta um umstøðurnar hjá starvsfólkunum á barnaheimsøkinum?
3. Metir landsstýrismaðurin, at støðan á barnaheimsøkinum er nøktandi fyri børnini og livir upp til sáttmálan um barnarættindi?
4. Er tað gjørdur ein raðfestur listi við tíðarfreistum fyri, hvussu tilmælini frá Umboðsmanninum verða sett í verk?
5. Hvørjar eru grundgevingarnar fyri at broyta fakliga tilmælið um at byggja eitt barnaheim til heldur at byggja barnabústovnar?
6. Hvør fakmyndugleiki hevur tikið hesa avgerð, og hvør fakmyndugleiki hevur verið við í tilgongdini?

Viðmerkingar:
Støðan á Barnaheiminum hevur ikki verið nøktandi í longri tíð. Tíðliga í ár var støðan sera ring, fólk fóru úr starvi, og trivnaðurin var vánaligur. Vit fingu tá at vita, at arbeitt bleiv við málinum og at tiltøk vóru sett í verk fyri at bøta um støðuna. Nú móti ársenda fáa vit aftur at vita, at støðan ikki er nøktandi á Barnaheiminum. Løgtingsins umboðsmaður hevur fylgt málinum upp og er komin til, at tað framvegis eru stórir trupulleikar á barnaheimsøkinum, serliga á Argjaboða.
Millum annað vísir umboðsmaðurin á ónøgd við leiðslu og leiðslubygnað, sum tó er ymiskt millum ymisku búeindirnar. Umboðsmaðurin mælir til, at samskiftið millum leiðslu og starvsfólk verður ment soleiðis, at týdningarmikil boð frá starvsfólkum koma upp til ovastu leiðslu í hóskandi tíð.
Mest skelkandi niðurstøðan er, at harðskapurin er øktur á eina bústovninum. Víst verður á óhepna samanseting av børnum, og at millum annað fysisku karmarnir og mistrivnaður millum starvsfólk eru týðandi orsakir. Í hesum umstøðum hava nøkur børn búð í fleiri ár.
Tað er eisini víst á manglandi skúlatilboð til børnini, sum ger støðuna hjá børnunum enn verri. Og týdningin av at hava gott samskifti við foreldrini. Samanumtikið eru nógv viðurskifti at fáa í rættlag og nógv tilmæli í frágreiðingini hjá Umboðsmanninum.
Tá ið børn verða sett heiman við umsorganaryvirtøku, áliggur tað eisini ein skylda um umsorganarábyrgd. Og sjálvsagt eisini ein skylda um at halda barnarættindasáttmálan. Tí er alneyðugt, at landsstýrismaðurin tryggjar, at so verður gjørt.
Tørvurin á at Barnaheimið fær nýggj og hóskandi hølisviðurskifti er eyðsýndur. Í longri tíð hevur verið arbeitt við eini ætlan um at byggja nýtt barnaheim. Tað er komið alment

fram, at ætlanin at byggja eitt barnaheim er broytt til heldur at byggja fleiri barnabústovnar. Tað hevur verið grundgivið við at tað er eitt fakligt tilmæli at fara frá einum barnaheimi til fleiri barnabústovnar. Barnaverndarstovan hevur alment víst á, at tey undrast á hetta og eisini á, hví tey ikki eru tikin við upp á ráð. Tí er spurningurin, hví fakliga tilmælið er broytt, og hvør hevur broytt tað.

Á Løgtingi, 9. desember 2020

Sirið Stenberg